Frásøgn: Copenhagen GM

Copenhagen GM varð telvað í døgunum 26. – 30. mars 2014. Kappingin varð skipað sum ein lukkað GM-kapping við tíggju luttakarum, harav eg var styrkismettur sum nummar fýra. Eg hevði ikki tikið lut í kappingum á høgum støði í eitt hálvt ár og væntaði mær tí ikki nakað serligt av kappingini, men gleddi meg at setast við talvborðið aftur. Fyri ikki at koma til kappingina heilt uttan dystarvenjing telvaði eg tvey talv við enska liðnum hjá mær, Cheddleton, vikuskiftið fyri. Har bleiv tað til tvey spennandi talv, sum bæði endaðu við javnleiki.

Rustur sást tó aftur í fyrsta talvinum í Keypmannahavn, tí eg kom undir trýst við svarta fólkinum og mátti kýta meg fyri at bjarga javnleikinum ímóti lægstrataða telvaranum í kappingini, FM Jakob Aabling-Thomsen (2365). Hann telvaði tó eina fína kapping og fekk sín triðja IM-norm, tá avtornaði. Heldur ikki í øðrum umfari kom eg væl frá byrjanarspælinum, hesaferð við hvíta fólkinum, men 18 ára gamli IM Mads Andersen (2497), sum væntandi verður stórmeistari heilt skjótt, telvaði ov óambitiøst. Eg slapp at festa svørtu finnurnar á sama lit sum bispurin hjá honum og vann eitt fínt endatalv við góðum riddara ímóti ikki-so-góðum bispi.

Nú var eg komin í gongd, og í triðja umfari skuldi eg hava GM Carsten Høi (2396) við svarta fólkinum. Eg havi góð minnir frá at telva ímóti Carsten, tí eg fekk mín fyrsta IM-norm við einum sigri á honum í síðsta umfari í Poltiken Cup í 2005. Hesaferð sá leingi út til at bera sama veg – eg telvaði eitt gott talv og fekk vinnandi støðu – men onkursvegna kláraði eg ikki at geva honum mønustingin, og stórmeistarin hóraði undan. Sum fleiri aðrir, sum fingu góðar støður ímóti honum, men blivu lumpaðir, mátti eg ásanna, at Carsten er hálur sum ein álur og ein sera góður fightari. Talvið er viðmerkt her: http://www.viewchess.com/cbreader/2014/4/2/Game25331270.html

Í fjórða umfari tapti eg eitt illa telvað talv við hvítum ímóti týskaranum IM Michael Richter (2470). Talvið frammanundan sat enn í beinunum, so segði hann, og eg fekk einki at rigga. Eg gloymdi at útvikla fólkið, og tað bleiv dúgliga revsað. Eg kom tó aftur í fimta umfari við einum fínum sigri við svarta fólkinum á GM Allan Stig Rasmussen (2487). Talvið var fyri tað mesta í javnvág, men so fekk eg ræði á einastu opnu linjuni á borðinum, og mótstøðumaðrin knekkaði í tíðarneyðini.

Í sætta umfari skuldi eg møta nýkleiktað danska IM'aranum, Igor Teplyi (2395). Ein sigur við hvíta fólkinum var avgerandi fyri, um eg kundi blanda meg í oddastríðið. Eg havi viðmerkt talvið her: http://www.viewchess.com/cbreader/2014/4/2/Game24423188.html

Í sjeynda umfari gjørdist tað ein javnleikur við svørtum ímóti GM Vladimir Georgiev (2553). Eg var nú í tí støðu, at eg kundi skora ein GM-norm við sigrum í seinastu tveimum talvunum. Hetta var næstan við at gerast realistiskt – helt eg sjálvur – tí eg fekk góða støðu við hvítum ímóti einans 16 ára gamla IM Rasmus Svane (2477). Týskarin, sum er hálvur danskari, fann tó eina snilda verju, sum eg hevði yvirsæð. Við einari frífinnu á frúgvasíðuni

var tað bert hann, sum kundi spæla upp á at vinna, men so bjóðaði hann brádliga javnleik. Eg var júst við at fyrireika meg til eitt langt stríð um javnleikin, so eg var fegin um tilboðið. Helst metti mótstøðumaðurin, sum skuldi hava 1½ stig frá tveimum teimum síðstu talvunum fyri at skora GM-norm, at tann lættasti mátin at gera tað var við at vinna við hvítum ímóti Aabling-Thomsen (2365) í síðsta umfari, men eftir eitt sera spennandi talv eydnaðist tað danskaranum at halda javnt har. Tað gongur tó neyvan rúm tíð, til Rasmus Svane verður stórmeistari, og eg verði ikki ovfarin, um hann hevur 2600 í rating um fá ár.

Sjálvur hevði eg lítið at telva um í síðsta umfarinum og tók ein skjótan javnleik við svørtum ímóti liðfelaga mínum í Philidor, IM Nikolaj Mikkelsen (2423). 5,5 stig av 9 møguligum rakk til 2. pláss í kappingini og gevur væntandi 5-6 ratingstig á kontoina. Eg slapp at lukta til GM-norm nummar tvey, og tað er góður íblástur til komandi kappingar í vár og summar. Samanumtikið ein fín kapping.